Smyril Line risa yvirskot

Tann 19. mars hevði Smyril Line ársaðalfund. Nevndarval, og var nevndin øll afturvald við Tormóði Djurhuus sum formanni.

Ársúrslitið hjá Smyril Line fyri 2001 var yvir 21 milliónir krónur, og við árslok hevði felagið eina samlaða bókførda eginogn á 210.326.603 krónur.

Nevnd og stjórn meta úrslitið nøktandi, og siga, at hetta er besta roknskaparliga ársúrslit hjá felagnum higartil.

-ib

Norrøna tekur skap

Nýggja Norrøna verður sjósett longu 24. august í ár. Hon kemur eftir ætlan til Føroya mánaðarskifti februar/mars komandi ár

Samstundis við at nýggja Norrøna byrjar at taka skap niðri í Týsklandi, økist vetrarsiglingin hjá Smyril Line. Norrøna fór niður í gjárkvøldið við 600 fólkum

FERÐING
Ingrid Bjarnastein

Nýggja Norrøna, sum í løtuni verður bygd niðri í Týsklandi, byrjar at taka skap. Tíðarætlanin heldur, og eftir ætlanini skal hon sjósetast 24. august í ár. Nýggja Norrøna kemur so til Føroya um mánaðarskiftið februar-mars 2003. Fleiri fólk hava longu skrivað seg upp til nýggju Norrønu við "jomfrúferðina". Ikki er vist enn nær hon verður, men nógv vilja standa uppskrivað fyri at tryggja sær eitt pláss.

Men samstundis sum Norrøna byrjar at taka skap, so økist vetrar siglingin hjá Smyril Line munandi.

– Ja, Norrøna fór avstað við umleið 600 fólkum í gjárkvøldið, og vetrarsiglingin í ár er væl betri enn vetrarsiglingin í fjør, sigur Áki Jespersen, deildarleiðari á Smyril Line.

– Tað vísir seg, at føroyingar hava uppdaga, at tað eisini ber til at sigla til Danmarkar, og tá siglt verður, tá hevur tú jú eisin møguleika at taka bil við. Soleiðis sleppur tú eisini frá at hugsa um víðari flutning, tí tú hevur jú bilin hjá tær alla tíðina.

Áki Jespersen heldur, at tað kann væl henda seg, at vetrarsiglingin kann gerast til eina sokallaða "up-season", tí ein øking hevur verið øll árini, og heldur han, at hon fer at halda fram.

Milan Orlowski og Jindrich Pansky eru heimskendir, bæði sum profesionellir borðtennisleikarar og sum undirhaldarar

Heimskendir borðtennisleikarar undirhalda í Havn leygardagin

Milan Orlowski og Jindrich Pansky, sum koma til Føroya í dag, endaðu á øðrum plássi í tvímansleiki í heimsmeistarakappingini í borðtennis í Svøríki í 1985, og Orlowski gjørdist evropameistari í 1974

Vilmund Jacobsen

Til tess at menna áhugan fyri borðtennisítróttini í Føroyum, skipar Borðtennissamband Føroya fyri sera áhugaverdum undirhaldi í Havn leygardagin.

Tveir heimskendir borðtennisleikarar koma higar í dag; teir eru kekkarnir, Milan Orlowski og Jindrich Pansky. Hesir eru ikki bara heimskendir sum profesionellir leikarar, men í fleiri ár eisini sum undirhaldarar. Teir hava ferðast um stóran part av heiminum við einum sonevndum "showi", sum teir framføra saman við dómara og áskoðarum. Hetta er einki minni enn ítróttarligt undirhald í heimsklassa.

Á Nabb og SMS

Um vikuskiftið verður eisini føroyameistarakapping fyri einstaklingar og í tvímansleiki fyri tey tilkomnu, og undirhaldstiltakið verður skipað sum ein partur av hesum.

Fyrstu ferð, hovið verður at síggja Orlowski og Pansky vísa síni kynstur, verður í SMS leygardagin kl. 14.00.

Seinnu ferð verður í ítróttarhøllini á Nabb leygarkvøldið kl. 19.00, beint eftir finalurnar í føroyameistarakappingini í borðtennis.

Flestu av okkum munnu onkuntíð hava sæð borðtennissnillingar í sjónvarpinum, og tað er slíkt undirhald, áskoðararnir kunnu vænta sær í SMS og áNabbi leygarkvøldið.

Orlowski og Pansky fara eitt nú at spæla við smáum bøttum, teir fara at leypa upp á borðið, og teir fara at gera tað mest óhugsandi, ið gerast kann frammanfyri og uppi á einum borðtennisborði.

Ein partur av undirhaldinum hjá teimum báðum plagar at vera, at annar leikarin setir ein krakk uppá borðið, sum hin síðan spælir á, aftur og aftur, meðan mótstøðumaðurin, sum skuldi staðið við endan, tekur eitt prát við dómaran!

Hesir menninir eru førir fyri at gera alt, sum gerast kann frammanfyri einum borðtennisborði.

Kappingin

Føroyameistarakappingin byrjar annars fríggjakvøldið kl. 18.00 í ítróttarhøllini á Nabbi.

Hetta kvøldið kappast gentur, dreingir, meðaldeildin og kvinnuunglingar.

Leygarmorgunin kl. 8 verður 1/4 finalan í ein mansleiki og 1/2 finalan í tvímansleiki hjá dreingjum, og tá byrjar eisini kappingin hjá mansunglingum. Kvinnurnar byrja kl. 9 og meistaradeildin kl. 9.30. Leygardagin kl. 12.30 verður blandaður tvímansleikur fyri leikarar, sum eru eldri enn 16 ár.

Kl. 18 leygarkvøldið verða so finalurnar, og kl. 19 byrjar so umrødda undirhaldi hjá heimskendu kekkunum báðum, Orlowski og Pansky.

Tiltakið endar leygarkvøldið kl. 21.30.

Kostnaðurin fyri er 40 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn.

Landshornorkestrin heldur filmskonsert

TÍÐINDASKRIV

Føroya landshornorkestur hevur konsert í kringluni í norðurlandahúsinum, sunnudagin 24.mars kl.16.00. Á skránni verður ymiskur filmstónleikur.

Føroya Landshornorkestur (FLH) er eitt hornorkestur við leikarum úr øllum Føroyum. Endamálið hjá orkestrinum er at veita bestu møguleikar til allar hornorkesturtónleikarar og slagverkstónleikarar, og at menna og hevja fatanina av hornorkesturtónleiki í Føroyum.

Fyrstu ferð eitt FLH spældi saman, var á hornorkesturstevnuni í Sørvági í 1999. Á hesi stevnu var eitt orkestur savnað, og spældið til konsert undir leiðslu av navnframa Geoff Richards. Hetta væleydnaða tiltak bleiv endurtikið á eini konsert í Norðurlandahúsinum undir leiðslu av Peter Parks.

Tann størstan avbjóðingin hjá FLH var luttøkan í evropeisku kappingini fyri hornorkestur ár 2000. Kappingin hetta árið var í Birmingham í Onglandi. Luttøkan í hesi kapping eydnaðist sera væl, og avgjørt varð, at hetta skuldi endurtakast.

Tað er síðani avgjørt at FLH skal luttaka aftur í EM-kappingini í 2003, ið verður hildin í Bergen. Í orkestrinum eru, 24 leikarar og leiðarin er bretin, Steve Foggin. Kostnaðurin fyri konsertina er 100 kr.

Felags framhaldsdeild loyst nógvar trupulleikar

– Vit kunna byrja við eini felags framhaldsdeild fyri teir fimm skúlarnar, sum í dag bert hava barnaskúlaflokkar. Tá fáa vit nakrar royndir, sum kunnu brúkast í komandi útbygging av skúlunum í kommununi, sigur Elin Lindenskov, býráðslimur í Havn

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

– Um vit høvdu ein felags framhaldsskúla í kommununi, var trupulleikin við skúlaskiftinum burtur, sigur Elin Lindenskov

Ein felags framhaldsdeild í Tórshavnar kommunu hevði loyst nógvar trupulleikar. Fyri tað fyrsta hevði hon bøtt um trongu hølisviðurskiftini á flestum skúlum og so hevði hon gjørt, at næmingar fingu fleiri vallærugreinir í boði. Tað heldur Elin Lindenskov, býráðslimur fyri Javnaðarflokkin, sum skjýtir upp at kanna møguleikan fyri eini felags framhaldsdeild fyri skúlarnar í Tórshavnar kommunu.

– Skúlaskiftið er eisini ein orsøk til, at tað er skilagott at hava ein felagsskúla. Sum skúlastýrislimur í Sankta Frans og Kollafjaðrar skúla, eri eg kunnað um teir trupulleikar, sum næmingar hava av skúlaskiftinum frá 7. til 8. flokk. Næmingarnir, sum flyta skúla, koma í flokk saman við næmingum, sum hava gingið øll sjey barnaskúlaárini á skúlanum. Tey kenna skúlan og ta mentan sum er har, meðan teir nýggju næmingarnir mugu venja seg við broyttu umstøðurnar. Ofta er tað sera trupult fyri einstakar næmingar, sigur Elin Lindenskov.

Grundarlag

Í Tórshavnar kommunu eru fimm barnaskúlar, sum ikki hava framhaldsdeild. Hoyvíkar skúli, Sankta Frans skúli, Kalbaks skúli, Kollafjarðar skúli og Adventistaskúlin. Í verandi skúlaári ganga tilsamans 128 næmingar í 7. flokki á hesum skúlum. 137 í 6. flokki, og 149 ganga í 5. flokki. Tilsamans 414 næmingar, sum næstu 3 árini, skula skifta skúla.

Umframt næmingarnar í barnaskúlunum, eru tilsamans 542 næmingar við fimta, sætta og sjeynda flokkunum á Argjum, á Venjingarskúlanum, í Kommunuskúlanum og í Eysturskúlanum. Tilsamans 956 næmingar sum komandi 3 árini skulu í framhaldsdeildina.

– Sambært næmingatalinum á teimum fimm barnaskúlunum í kommununi er grundarlag fyri einum ella tveimum felags framhaldsskúlum fyri hesar skúlar. Tilsamans ganga 416 børn í 5. – 7. flokki í ár.

– Vit kunna byrja við eini felags framhaldsdeild fyri teir fimm skúlarnar, sum í dag bert hava barnaskúlaflokkar. Tá fáa vit nakrar royndir, sum kunnu brúkast í komandi útbygging av skúlunum í Kommununi. Samstundis, sum vit loysa trupulleikarnar hjá næmingunum við skúlaskiftinum og vallærugreinunum, verður meira pláss á nøkrum av hinum skúlum, sigur Elin Lindenskov. Hon leggur afturat, at tørvur er eisini á einum eftirskúla fyri teir næmingar, sum ikki trívast.

Vallærugreinir

Mangan er tað trupult hjá næmingum at fáa ta lærugreinina, viðkomandi ynskir, tí ov fáir næmingar velja somu lærugrein. Ein størri framhaldsskúli hevði gjørt, at næmingagrundarlagið varð størri og tískil møguleikin betri til, at næmingar fáa ta lærugreinina, teir ynskja.

– Um vit høvdu ein felags framhaldsskúla í kommununi, var trupulleikin við skúlaskiftinum burtur. Tá vóru allir næmingarnir, sum byrja í 8. flokki nýggir. Øll byrja í nýggjum umhvørvi, sigur Elin Lindenskov.

Í uppskotinum vísir hon á, at kommunurnar í Sundalagnum hava drúgvar og positivar royndir við felagsframhaldsdeild á Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Elin Lindenskov mælir til, at uppskotið um felags framhaldsdeild verður sent skúlastýrunum og skúlaleiðslunum í kommununi til ummælis. Í løtuni fyrireikar umsitingin í býráðnum uppskotið til at leggja fyri mentamálanevndina.

Heidi er eitt stórt talent

SVIMJING
Elsa Johannessen, praktikantur

– Vit sóu beinanvegin at Heidi var eitt stórt talent við stórum svimjigávum, segði Katrin Johannesen á tíðindafundi á Hotel Hafnia í gjár.

Tá ið Heidi bert var 9 ár, byrjaði hon svimjingina á Oyrabakka. Seinni fór hon til Havnar at svimja í størri hyli.

– Vit sóu beinanvegin at hon var eitt stórt talent við stórum svimjigávum. Hon var skjót og so lá hon heilt ótrúliga væl á vatninum. Hon bleiv betri og betri fyri hvørja ferð, sigur Katrin Johansen, venjari. Í gjár var tíðindafundur á Hotel Hafnia, har Heidi Andreasen og venjarin hjá henni, Katrin Johansen, vóru at hitta.

Heidi heldur at stórt var at vinna silvur og bronsumerki í OL-leikinum og at vinna gull og bronsumerki í EM-kappingini í Stokkholm í fjør. Og aftaná ikki at kunna svomið síðani august, kom tað sum eitt stórt og yviraskandi herðaklapp. Men Heidi verður vónandi før fyri at leypa í hylin aftur í apríl, har hon má byrja frá grunduni av, og trena upp til VM-kappingina sum verður í Agentina í desember.

– Sjálvt um eg ikki havi svomið í seinastuni havi eg styrkivant, sum eg eisini geri tá ið eg svimji. Skjótt fari eg at fáa eina svimjimaskinu heima, ið er ein styrkivenjingarbonkur. Tað fíi eg fra Eiði kommunu sum ein hjálp, so kann eg trena heima í staðin fyri altíð at fara til Havnar. Har er jú eingin svimjihylur á Eiði.

Eisini er Heidi sera populer niðri. Hon hevur fingið áheitanir um at koma niður at svimja, men pápi hennara heldur fast við at hon skal verða verandi í Føroyum.

Heidi er í uppskoti til ársins ítróttarfólk við breki til Laureus sports awards 2002, ið bara er eitt trý ára gamalt tiltak. Fýra onnur eru eisini í uppskoti til tað sama, tað eru, Earle Conners, atletik úr Kanada, Gerd Schonfelder, skíing úr Týsklandi, Beat Schwarzenbach, súkkling úr S., Esther Vergeer, rullistóla tennis úr Hollandi.

Aðrar nominatiónir eru millum annað ársins ítróttarmaður, ársins ítróttarkvinna og ársins lið. Har eru fólk sum Ian Thorpe, Tiger Woods, Jennifer Capriati og Inge de Bruijn nomineraði. Og tvey sera kend lið eru Bayern München og Los Angeles Lakers.

Laureus world sport awards verður 14. mai í Monaco, og verður víst beinleiðis í sjónvarpinum, vónandi eisini í Føroyum.

Útgávur:

Døgverðabókin – hin grøna

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið bókina "Døgverðabókin – hin grøna" út av nýggjum. Hon hevur verið uppseld í nøkur ár, og er nú uppafturprentað í óbroyttur líki. Maria Vilhelm hevur lagt bókina til rættis, og Jan Jacobsen hevur teknað myndir til.

Bókin er ætlað undirvísingini í heimkunnleika í fólkaskúlanum, men uppskriftirnar hóska eisini væl í dagliga húsarhaldinum. Rættirnir eru ódýrir og skjótir at gera.

Í bókini eru 90 uppskriftir, sum fevna um døgverðar, súpanir og omaná, umframt baking og kóking. Maria Vilhelm hevur nýtt uppskriftirnar í undirvísingini og hevur gjørt uppskot til samanseting av rættum, ið eru við í bókini. Eisini er stutt frágreiðing um amboðini, køksreglur, fitievni, ger og sukur.

Allar síður í bókini eru plastaðar og tí væl egnaðar og haldgóðar til nýtslu í køkinum. "Døgverðabókin – hin grøna" er fyrra bókin av tveimum ætlað undirvísingini í heimkunnleika í fólkaskúlanum. "Døgverðabókin – hin grøna" er framhald av hesari bókini.

Per á Hædd hevur gjørt kápumyndina og Hestprent hevur prentað. Hon er 130 blaðsíður og kostar 160 kr. í bókabúðunum.